# Stríðsviljin

**Tá mest stóð á var tað stríðsviljin hjá VÍF, sum gjørdist avgerandi, helt Nicolina Eyðbjørnsdóttir eftir dystin**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*



*- Sjálvandi voru tær ógvuliga uppsettar, og ein finaludystur er altíð torførur helt Nicolina um dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í løtum var talan um rættiliga kontant verjuspæl í steypafinaluni, men hóast hetta, so helt Nicolina Eyðbjørnsdóttir eftir dystin, at talan ikki hevði verið um ein óvanliga harðan dyst.

- Sjálvandi vóru tær ógvuliga uppsettar, og ein finaludystur er altíð torførur. Tað gjørdi nokk sítt til, at dysturin í løtum gjørdist heldur rótutur, og til tíðir brendu vit eisini alt ov nógvar málmøguleikar. Kanska hongur tað eisini saman við, at vit høvdu nýtt so nógvar kreftir í verjupartinum, tí konsentratiónin var ikki nóg góð alla tíðina, helt hon.

Um løtuna, tá Stjørnan hóttti við at eta leiðsluna hjá VÍF upp, segði Nicolina, at hetta sjálvandi ikki kom serliga væl við hjá teimum.

- Vit høvdu tosað um hetta í steðginum, tí vit vistu, at tær fóru at stríðast til tað seinasta. Kanska tóku vit ótilvitað ov lætt upp fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, men tíbetur fingu vit so eisini víst, at stríðsviljin hjá okkum eisini er góður, og tað haldi eg varð avgerandi fyri sigrinum, segði Nicolina Eyðbjørnsdóttir at enda.

Joan M. Joensen:

# Halda ikki ferðini



*- Til tíðir koyrdi spælið hjá okkum heilt hampuligt, men vit megna ikki at halda ferðini nóg leingi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Spælskiparin hjá Stjørnuni var ikki nøgd við avrikið í finaludystinum. Ferðin var ov lítil, helt hon**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað var ein sjónliga vónbrotin Joan Midjord Joensen, sum vit fingu orðið á, tá steypafinalum hjá kvinnunum var avgreidd.

Spælskiparin hjá Stjørnuni hevði sjálvandi havt vónir um eitt betri úrslit, og hóast tað eydnaðist Stjørnuni at avmarka máltalið hjá VÍF til 22, so tóktist hon alt annað enn nøgd um hetta.

- Vit komu for langt aftur um í fyrra hálvleiki, og tað megnaðu vit so ongan tíð at vinna aftur.

Við hesum sipaði hon sjálvandi til seinasta korterið av fyrra hálvleiki, tá VÍF skoraði seks ferðir á rað, men hon dugdi tó ikki at siga, hvat tað var, sum gekk galið hesa løtuna.

- Tað er so ringt at siga, at akkurát hatta og hatta gekk galið. Til tíðir koyrdi spælið hjá okkum heilt hampuligt, men vit megna ikki at halda ferðini nóg leingi.

- Orkan skuldi annars verið nóg góð, og í øðrum dystum hava vit í nógv størri mun havt ferð á, men tað gekk bara ikki í dag. Soleiðis kendist tað í øllum førum hjá okkum á vøllinum. Eg veit ikki, hvussu dysturin sá út frá áskoðarapláss unum, men her inni frá sá tað als ikki nóg gott út, staðfesti hon at enda.

Stjørnan-VÍF 18-22 (7-13):

# VÍF á greipuferð



*Kvinnurnar hjá VÍF eru annað árið á rað steypavinnarar. Tó at talan til tíðir var um ein spennandi dyst, so var finalusigurin á Stjørnuni fult uppiborin*
*Myndir frá dystinum: Álvur Haraldsen*

**Kvinnurnar úr Vestmanna vunnu aftur í ár Coca-Cola kappingina. Sigurin á Stjørnuni var uppiborin, men tað vóru serstakliga tvær á liðnum, sum skaraðu burturúr**

COCA-COLA FINALAN – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Hóast illsliga veðrið hevði forðað nógvum klaksvíkngum í at koma til Havnar, so mundu karmarnir í Høllini á Hálsi tó vera so hampuliga góðir, tá farið varð undir steypafinalurnar 2002.

Alla staðni var at kalla stúgvandi fult, og við bæði sjón- og útvarpi á staðnum átti hetta í øllum førum verið nakað, sum fekk blóðið hjá einstøku leikarunum í kók.

## Kontantar verjur

Tað var eisini tíðliga greitt, at Stjørnan so avgjørt ikki hevði ætlanir um at geva VÍF nakran lættan finaludyst.

Frá fyrsta bríksli løgdu klaksvíksgenturnar hart út. Við einum sera agressivum eittara varð roynt at byrgja upp fyri skothóttanini frá vanliga málsóknu VÍF-leikarunum, so hesar í øllum førum skuldu hóreiggja sær, sum tær vanliga gera.

Í hinum endanum var somuleiðis talan um kontant verjuspæl úr ovastu skuffu. Ferð eftir ferð sóust tær hjá Stjørnuni eymka seg, eftir at tær høvdu rent seg fastar í VÍF verjuna. Serstakliga riggaði verjan væl í vinstra borði, har Adrijana hevði meira enn trupult við at koma ígjøgnum.

Sum hálvleikurin leið, so gjørdist tað alt meira greitt, at harða kropsliga spælið hóskaði VÍF munandi betri enn Stjørnuni. Tær úr Vestmannan tóktust í øllum førum at hava nógv tað størri yvirskotið, báði kropsliga og sálarliga, og spakuliga tóku tær at draga frá á máltalvuni.



*Saman við Manuelu Stan tykist Sóley Mikkelsen at stórtrívast í týdningarmiklum dystum, og týdningur hennara fyri VÍF varð enn eina ferð undirstrikaður leygardagin*

## Málverjin hjá VÍF

Tað hoyrir eisini við til alt hetta, at VÍF í Manuelu Stan hevur í serflokki besta málverjan í landinum. Áður er nevnt, at hon er eitt upplagt evni, tá ársins leikari skal veljast í ár, og í hesum stendur hon so avgjørt ikki veikari eftir finaludystin.

Eitt er, at ein málverji stendir væl, og tekur tað, sum hon skal gera, men tað tykist, sum um Manuela onkursvegna hevur ein serligan eginleika, sum ger, at hon altíð stendur væl, tá tørvurin á tí er størstur.

Í finaluni kom hetta ikki minst til sjóndar seinastu fimm minuttirnar undan steðginum. VÍF hevði tá togað seg nakað væl framum, men tá tær brádliga fingu tvær útvísingar á rað, fór at sansa at.

Millum annað takkað verið tveimum brotsskastsbjargingum á rað frá Manuelu eydnaðist tó VÍF at vinna undirtalsstøðuna, og spurningurin er eisini, um júst hetta ikki var avgerandi løtan í dystinum. Sum um Stjørnan eftir hetta visti, at tá tær ikki kundu vinna við seks móti fýra, hvussu skuldi tað so kunna ganga við seks móti seks?



## Eitt seinasta sprell

Í seinna hálvleiki royndi Stjørnan eina løtu at gera eitt sprell, soleiðis at spenningur aftur kundi koma í dystin.

Kanska hevði VÍF ótilvitað sett ferðina nakað niður, men undir øllum umstøðum so fingu tær ikki loyvi til at ganga sigurin heim. Tær máttu stríðast, og tað gjørdu tær so sanniliga eisini. Ferðin varð enn eina ferð sett upp. Verjan gjørdist tættarí og mótálopini fleiri, og so kom munurin av álvara í aftur.

Tær øktu upp í 19-13, og við einum korteri eftir at spæla í, so var tað nú øllum greitt, at her fór bert at gerast talan um hitt eina liðið. Gaman í fekk Stjørnan minkað um munin seinastu løtuna, men tað var ov seint. VÍF eru aftur í ár steypavinnarar, og sigurin var fult so uppiborin hesaferð, sum hann var tað í fjør.

## Profilurin

Hóast hondbóltur fyrst og fremst er eitt liðspæl, so slepst ikki undan at taka einstakar av leikarunum hjá FÍF fram. Leikarar, sum onkursvegna hava alstóran týdning fyri avrikið á liðnum.

Omanfyri hava vit nevnt Manuelu Stan sum eitt upplagt evni til ársins leikara, men eisini leikarin, sum vann hendan heiðurin í fjør, er so avgjørt millum týdningarmestu liðirnar á VÍF liðnum.

Sóley Mikkelsen er sjáldan tann, sum ger mest háva burtur úr sær sjálvum, men hetta forðar henni ikki í at taka ábyrgd, tá nógv stendur á. Ferð eftir ferð hevur hon prógvað, at tað júst er í teimum stóru dystunum, at hon tekur um endan, og tað gjørdi hon eisini hesaferð. Serstakliga fyrstu løtuna, tá Stjørnan hevði gott tak á, var týdningur hennara sjónligur, og ikki minst var tað hennara fótskifti fyri at takka, at klaksvíkingarnir noyddust at umskipa verjuna eitt sindur flatari, so plássið ikki skuldi gerast ov gott.

Og so skal eisini leggjast afturat týdningurin, sum Sóley hevur í verjupartinum. Sum so var akkurát líka mikið hjá henni, um tað var Joan ella Adrijana, sum royndi at bróta ígjøgnum í hennara síðu. Sum størsta sjálvfylgjan varð rennibanin hjá áleyparanum hvørja ferð avskorin, soleiðis at støðurnar aloftast vórðu steðgaðar, áðrenn vandi var á ferð.

Nú skulu hinir leikararnir hjá VÍF ikki gloymast á nakran hátt, men tað er ein sannroynd, at uttan júst tær báðar, Manuelu og Sóley, hevði liðið í øllum førum ikki verið eins einaráðandi, sum tær hava verið skjótt tvey ár. Tær høvdu kanska verið meistarar og kanska eisini steypavinnarar, men slíkir leikarar eru sum skaptar til teir stóru dystirnar, og tað er ein eginleiki, sum ofta er gull verdur. Og tað var hann so sanniliga eisini leygardagin.



*Stjørnan royndi serstakliga í byrjanini at takla málsóknu bakspælararnar hjá VÍF. Her hevur Bára fingði fatur í Nicoletu*

## Dysturin í tølum

**Stjørnan-VÍF 18-22 (7-13)**

Støður í dystinum:
2-2, 6-7, 7-13, 11-14, 13-19, 18-22

Málskjúttar:
Stjørnan: Simona Dziugyte 7(4), Joan M. JOensen 6(1), Anna Kristina Samson 4, Beinta Klakstein 1
VÍF: Soley Mikkelsen 7(2), Ioana Rápa 6(1), Jórun Ludvig 4, Nicoleta Radu 2, Alis Høghamar 1, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 1, Jacklin Durhuus 1

Brotskøst: Stjørnan 7, VÍF 4

Útvísingar: Stjørnan 5, VÍF 4

Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Fingu sum sína seinastu uppgávu í ár eina steypafinalu, og hana greiddi teir eisini so hampuliga væl.

# Seinasti dysturin

**Jórunn Ludvig er nú farin í summarfrí. Knæið vil ikki spæla við meira, sigur hon**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*



*Pínan í knænum er nú somikið ógvuslig, at Jórun Ludvig ikki fer á vøllin aftur í hesum kappingarárinum*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*

Hjá Jórunl Ludvig var steypafinalan móti Stjørnuni seinasti dysturin hetta kappingarárið. Hon hevur ígjøgnum stóran part av árinum drigist við skaða í knænum, og nú heldur hon ikki, at hon er før fyri at bíta pínuna í seg.

- Eg varð skurðviðgjørd í heyst, men tað gekk ikki heilt sum tað skuldi, og hóast eg havi kunna spælt, so er pínan alla tíðina versnað.

- Eg vildi tó sjálvandi hava finaludysti við, soleiðis at eg um ikki annað kundi enda árið gott, og tað gekk so í øllum førum, segði ein hóast alt fegin Jórun eftir finalusigurin.

# Tryggleikin avgerandi



*Tróndur Álvsson var minst líka fegin sum mamman um steypasigurin, og ikki minst mundi tað kennast stuttligt at kunna erpa sær fyri bæði sjónvarpi og bløðum eftir dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sóley Mikkelsen helt eftir dystin, at tað hevði verið teimum ein stór hjálp, at tær høvdu roynt at gjørt sum minst burturúr, at talan var um steypafinalu**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Sum nevnt aðrastaðni, so var ein av stóru leikarunum í dystinum liðskiparin hjá VÍF, Sóley Mikkelsen.

Tá vit tosaðu við hana undan dystinum legði hon dent á, at tær royndu at gera hetta til ein so vanligan dyst sum gjørligt, og eftir dystin tóktist hon eisini sannførd um, at tað var ein av orsøkunum til finalusigurin.

- Sæð burtur frá finalunum, sum eg havi vunnið við VÍF, so havi eg bert eina aðra ferð verið í finaluni. Tað var við StÍF, og tá varð heilt nógv gjørt burturúr. Vit ótu á hotelli og gjørdu ting, sum vit ikki vóru vanar við, og tá verður tað ov nógv av tí góða eftir mínum tykki.

- Hesa ferð var einasti munurin tann, at vit ferðaðust til dystin saman, men annars var alt sum vant, og tað gevur eitt slag av tryggleika, heldur hon.

## Mistu takið

Um sjálvan dystin helt Sóley annars, at hann í høvuðsheitum gekk soleiðis, sum tær høvdu ætlað.

- Tað var bara handan løtan í seinna hálvleiki, at vit veruliga mistu takið. Eisini hóast vit høvdu tosað um hetta í hálvleikinum. Tað var í øllum førum ikki soleiðis, at vit hildu okkum hava vunnið dystin. Vit søgdu við hvørja aðra, at alt framvegis var opið, og at vit í høvdinum skuldu byrja seinna hálvleik við støðuni 0-0, men tað riggaði bara ikki.

- Tíbetur fremja tær tó nøkur mistøk, so vit aftur fáa yvirtakið, og at enda var nokk eingin ivi um, at vit skuldu vinna, segði ein fegin steypavinnari eftir dystin.